Koyr okkurt í mína hosu

1. Koyr okkurt í mína hosu
góði jólamaðurin.
Tá ið eg liggi og sovi,
Eg droymi, at tú kemur inn.

2. Góði tú má ei gloyma,
hosan hongur her hjá mær,
beiggi mín ætlar at royna,
at vita um hann eisini fær.

Jólamenn vit geva bert,
um tit eru góð,
mammu tit skulu akta væl
og vera so glað og fró og góð

3. Gev okkum okkurt smáting
góði jólamaðurin
við øllum klokkum tá ring,
so at tú tá sleppur inn.

Jólamenn vit geva bert,
um tit eru góð,
mammu tit skulu akta væl
og vera so glað og fró og góð

4. Hoyr góði jólamaðurin
hví hevur tú so stórt hvítt skegg
í reyðum klæðum glaður
og góðum børnum gevur nógv.

5. Gloym ikki lítla bróður
hann svevur inni her hjá mær,
lítil hann er og góður
lítla hosu her tú sær.

Jólamenn vit geva bert,
um tit eru góð,
mammu tit skulu akta væl
og vera so glað og fró og góð

Eg eri so spent til jóla

1. Eg eri so spent til jóla,
eg fái ein nýggjan kjóla
og jólagávurnar nógvar
og eisini nýggjar skógvar.

2. Tað er so leingi at bíða –
hygg nú fer mánin at líða
Øll hava so nógv at gera –
eg veit ikki, hvar eg skal vera.

3. Eg greiði mær ein hestahala
og fari í býin at mala –
ein túr inn á konditturíið
og siti so fitta har og bíði

4. Tá inn kemur ein jólavættur.
Hon hevur ei hala – men flættur.
Hon teskar í oyrað á mær:
Kom við – so skal eg fylgja tær.

5. Eg kann ikki her siga tær
frá øllum, sum hon vísti mær.
Og sjálvt um tú ikki mær trýrt –
so veit eg nú hvar ið hon býr.
Ja – sjálvt um tú ikki mær trýrt –
so veit eg nú hvar ið hon býr.

Rudolf!

1. Kenna tit lítla Rudolf, hann sum hevði reyðan tút.
Hann var eitt lítið reinsdjór og hann sá so skegur út.
Øll onnur reinsdjór flentu eftir hansar reyðu nøs.
Hann vildi burt seg krógva.
Tók uppá seg brillugløs.

Niðurlag: 2 ferðir
Men so eina jólanátt mjørkin tjúkkur var,
rópti jólanissan hjálp, Rudolf kom og lýs fyri mær.
Rudolf´sa nøs hon lýsti, líkasum ein lummalykt
og jólanissum vísti.
Heim til hús so trygt.